# Helena Dam á Neystabø stevnd fyri ærumeiðing

*Fyrrverandi leiðarin á Landssjúkrahúsinum, Jákup Mørkøre, krevur persónliga uppreisn og at vera reinsaður*



*Helena Dam á Neystabø noyðist nú í rættin at verja uppsøgnina av Jákupi Mørkøre, leiðara á Landssjúkrahúsinum. Bjørn á Heygum, sakførari hjá Jákupi Mørkøre heldur, at hann varð gjørdur til syndabukk og kevur fulla uppreisn*

ÁKI BERTHOLDSEN

Tað er nú greitt, at Helena Dam á Neystabø noyðist í rættin fyri at hava sagt Jákup Mørkøre upp sum leiðara á Landssjúkrahúsinum.

Annars hevur ongin ivi verið um leingi, at Helena Dam á Neystabø fór at verða stevnd, men nú er tað so veruleiki.

Tí mikudagin læt Jákup Mørkøre Føroya Rætti stevningina ímóti landsstýrismanninum.

Jákup Mørkøre stevnir í Helenu Dam á Neystabø fyri ærumeiðing, tí hon hevur skuldsett hann fyri at vera ólýðin og óloyalan.

Í fyrra lagi verður kravt, at hesar útsagnirnar verða dømdar deyðar at vera og at Landsstýrismaðurin skal rinda kostnaðin av at kunngerða dómin við grundgevingum.

Fær Jákup Mørkøre ikki viphald frá rættinum um, at han er ærumeiddur, krevur hann í øðrum lagi, at Helena Dam á Neystabø verður dømd at viðurkenna at saksøkjarin ikki hevur verið ólýðin og illoyalur ímóti yvirskipaðu leiðsluni, sum í hesum føri er Almanna og Heilsumálastýrið.

Og at enda krevur Jákup Mørkøre, at Landsstýrismaðurin verður dømdur at rinda sakarkostnaðin av hesum máli.

Tað er Bjørn á Heygum, sum er sakførari hjá Jákup Mørkøre í hesum máli.

Málið kemur fyri í Føroya Rætti týsdagin 9, mai klokkan 10.

### Leingi verið greitt

Sum sagt omanfyri, hevur tað annars leingi verði greitt, at Helena Dam á Neystabø fór at verða stevnd í hesum máli.

Einasta ivamál hevur verið, hvussu stevningin fór at ljóða og, um tað skuldi vera Jákup Mørkøre sjálvur, ella fakfelag hansara, Verkfrøðingarfelagið, sum skuldi standa fyri stevningini.

Formaðurin í Verkfrøðingafelagnum, Suni Joensen hevur áður sagt fyri Sosialinum, at arbeitt hevur verið við trimum møguleikum.

Antin kundi felagið, ella Jákup Møkøre sjálvur stevna Helenu Dam á Neystabø við kravi um, at uppsøgnin var ólóglig, ella kundi hann krevja starvið aftur, ella í triðja lagi kundi Jákup Mørkøre stevna fyri ærumeiðing. Í samráð ímillum Jákup Mørkøre og felagið er úrslitið so blivið, at Jákup Mørkøre stevnir sjálvur fyri ærumeiðing.

Fyrimunurin við eini slíkari stevning er, at tað er nógv skjótari at fáa eitt mál um ærumeiðing avgreitt, enn tað er at fáa hini málini avgreitt.

Men fær Jákup Mørkøre viðhald í stevningini um ærumeiðing, er tað sannlíkt, eitt eitt annað sakarmál um sjálva uppsøgnina kemur at fylgja í kjalarvørrinum á tí hevur Suni Joensen sagt.

Leggjast skal afturat, at Jákup Mørkøre hevur fullan stuðul frá Verkfrøðingafelagnum í hesum málinum.

Bjørn á Heygum sigur m.a., at tá ið málið allan vegin ber týðiligt bráð av ósakligheit og óviðkomandi fyrilitum, verður kravt, at saksøkjarin fær persónliga uppreisn og verður reinsaður fyri tær vanærandi og niðurgerandi skuldsetingar, sum hava skatt hann almikið.

### Helena visti um alt

Bjørn á Heygum sigur, at tað er onki hald í skuldsetingunum um ólýdni og óloyalitet.

Og hetta eru so grovar, niðurgerandi og álvarsamar skuldsetingar, at hetta kemur undir ærumeiðing.

– Talan er um eginleikar, sum eru alneyðugar fyri at varðveita eitt ávíst trúvirði.

– Og tað er rættiliga avgerðandi fyri vinnumøguleikarnar hjá Jákupi Mørkøre, at ivi ikki verður sáddur um hesar týðandi eginleikarnar, sigur sakførari hansara.

–Serstakliga eigur dentur í hesum sambandi at verða lagdur á, at tað serliga álitisstarv, sum Jákup Mørkøre hevur røkt og at tað tí er serstakliga óheppið og oyðileggjandi fyri hann, at slíkar ákærur verða reistar, sum gera hann óskikkaðan at røkja samsvarandi størv í framtíðini.

Bjørn á Heygum sigur, at tað kann ikki vera nakar ivi um, at sjúkrahúsleiðarin hevur eina greiða skyldu at syrgja fyri at halda tær fíggjarligu játtanir, sum sjúkrahúsið fær.

–Tí má tað metast sum greitt tænastubrot um hann ikki tók hesi viðurskifti í álvara við tí úrslitið, at fíggjarætlanin ikki helt.

Sakførarin sigur, at tað er heilt greitt av øllum tí tilfari, sum liggur í málinum, at Jákup Mørkøre gjørdi bara tað, sum honum varð álagt og at Helena Dam á Neystabø var alla tíðina fult og heilt kunnað um gongdina.

– Tískil ber tað heilt einfalt ikki til at skuldseta Jákup Mørkøre fyri ólýdni og óloyalitet, bara tí at hann ger sína skyldu og ger, sum hann er biðin.

Bjørn á Heygum sigur, at tað er orsøk til at halda, at veruliga orsøkin til uppsøgnina er eitt bræv, sum Helena Dam á Neystabø fekk frá Løgmanni.

Í tí brævinum finst Løgmaður at Helenu Dam á Neystabø fyri, at hon ikki hevur kunnað hann um hópuppsagnir á Landssjúkrahúsinum, sum er eitt álvarsmál.

–At tílík stórmál verða borin fram í fjølmiðlunum, uttan at løgmaður er kunnaður, og uttan at málið er viðgjørt í Landsstýrinum, er als ikki nøktandi. Løgmaður kann als ikki góðtaka hesa framferð, sigur Anfinn Kallsberg.

Hann sigur, at er hetta úrslit av vánaligari embætisførslu í fyrisitingini hjá Helenu Dam á Neystabø, eigur tað at fáa avleiðingar.

Men fæst greiða ikki á hesum alt fyri eitt, fer Løgmaður sjálvur at taka neyðug stig í hesum máli, endar Anfinn Kallsberg brævið til Helenu Dam á Neystabø.

Bjørn á Heygum sigur, at hetta brævið frá Løgmanni gjørdi, at tað varð umráðandi hjá Helenu Dam á Neystabø at finna onkran, sum kundi fáa skyldina fyri hetta vánaliga arbeiðslagið og embætisførsluna, sum Løgmaður sipar til.

– Og tí varð Jákup Mørkøre sagdur upp.

# Fara skjótt at niðurleggja kavaruddingina

*Hóttanin frá Føroya Arbeiðarafelag um at niðurleggja kavaruddingina hjá Landsverkfrøðinginum, stendur við. Og nú verður ikki bíðað leingi afturat*

ÁKI BERTHOLDSEN



*Hóttanin um at niðurleggja kavaruddingina, stendur við, sigur Ingeborg Vinther*

Tað mundu vera mong, sum, sum bíðaði við størsta spenningi eftir, hvussu tað fór at vera við kavaruddingini, nú hann aftur legðist við høgætt og kavarokið

Seinasta vikuskiftið hótti Føroya Arbeiðarafelag nevniliga við at niðurleggja alla kavarudding, næstu ferð, tað fór at kava.

Orsøkin er, at ósemja hevur tikið seg upp um, hvørja løn arbeiðsmenninir hjá Landsverkfrøðinginum skulu hava fyri vera á tilkallivakt um kvøldarnar.

Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag segði við Sosialin fekst ikki semja, er bara eitt at gera og tað er at niðurleggja kavaruddingina.

Og tað hevði lagt alla samferðslu á landi í Føroyum lamna, um tað fer at kava.

### Takast í fullum álvara

Men nú uppundir vikuskiftið hendi júst tað, at tað fór at kava av grimd, men Landsverkfrøðingurin- gróv við sama lag - og tað ger hann enn.

Men Ingeborg Vinther leggur stóran dent á, at hetta merkir ikki, at fráboðanin seinasta vikuskiftið bara var tóm orð.

– Fráboðanin skal takast í størsta álvara. Og hon stendur framvegis við, sigur Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at í farnu viku kom eitt nýtt uppskot frá Landsverkfrøðinginum um, hvusssu arbeiðsmenninir skulu lønast fyri tilkallivaktirnar um kvøldið.

Og nú er tað so, at menninir hjá Landsverkfrøðinginum eru spjaddir um alt landið, so tað tekur sína tíð at fáa eitt slíkt uppskot viðgjørt.

Og fyrrenn tað er liðugt viðgjørt, verða sjálvandi ongi tiltøk sett í verk.

Men Ingeborg Vinther leggur dent á, at er uppskotið ikki nøktandi, er onki at gerast uttan at niðurleggja kavaruddingina.

– Tað er eitt mark fyri, tí tað er eitt mark fyri, hvussu leingi vit kunnu samráðast um eitt mál, har vit ikki koma nakran vet

Hon sigur, at væntandi fæst greiði á málinum einaferð í hesi vikuni.

### Vil ikki gjalda

Formaðurin í Føroya Arbeiðarafelag sigur, at ósemjan við Landsverkfrøðingin snýr seg um, hvussu nógva løn, arbeiðsmenninir skulu hava fyri at vera á tilkallivakt um kvøldið.

Í sáttmálanum er lønin fyri at vera á tilkallivakt 14 krónur um tíman mitt í viku og 28 krónur í vikuskiftunum.

Men verða menninir boðsendir til arbeiðis, fáa teir vanliga tímaløn við tí ískoyti, teir eiga at fáa, men tær 14, ella 28 krónurnar um tíman fyri tilkallingina, missa teir.

Ingebrog Vinther sigur, at Landsverkfrøðingurin er sinnaður at betala tilkallivakt um morgnarnar og í vikuskiftunum, men ikki um kvøldarnar gerandisdagar. Tað skal fáast í rættlag nú, annars er onki at gera, uttan at niðurlegja kavaruddingina, sigur Ingeborg Vinther.



# Íslendskir blásarar blæsa føroyskar tónar

*Út er komin fløga, har Blásarakvintett Reykjavíkar - Reykjavík Wind Quintet - leikar tónar eftir føroysk tónaskøld. BIS gevur út og merkir hetta, at fløgan kemur víða um. Leygardagin savnaðust tónleikarar og tónaskøld í Listaskálanum*



*Blásarakvintett Reykjavíkar*
*Mynd Dagfinn Olsen*

DAGFINN OLSEN

Leygardagin hittust í Listaskálanum tónleikarar, tónaskøld og útgevarar. Tónaskøldini vóru føroysk og tónleikararnir íslendskir.

Teir leika í Blásara Kvintett Reykjavíkar,ið hevur spælt inn verk hjá føroyskum tónasmiðum.

Tað er forlagið BIS, ið gevur út. Stjórin fyri BIS, Robert v Bahr, var eisini til staðar, eins og føroyska umboðið, ið er fløguhandlin HCW Tórgarð. Eisini var umboð fyri Samfundet, ið gevur symfoniina hjá Sunleifi Rasmussen út.

Umboðaðu tónaskøldini á fløguni eru Pauli í Sandagerði, Sunleif Rasmussen, Kristian Blak, Edvard Nyholm Debess, Kári Bæk og Atli Petersen.

Kvintettin leikti eitt verk eftir Atla Petersen. Í Kvintettini eru Bernharður Wilkinson, floyta, Daði Kolbeinsson, obo, Einar Jóhannesson, klarinett, Jósef Ognibene, horn og Hafsteinn Guðmundsson, fagott.

Forlagið BIS hevur stórt virksemi um stóran part av heiminum og er hetta tí óførur møguleiki hjá føroysku tónaskøldunum at fáa tónleik sín út um landoddarnar.

Tað var Felagið Føroysk Tónaskøld, ið skipaði fyri tiltakinum leygardagin.

Fløgan nevnist Cantus Borealis. Windmusic from the Faroe Islands. Tey leikandi eru Reykjavík Wind Quartett og Guðríður Sigurðardóttir, piano.



*Tónaskøld og útgevarar lurta hugtikin*
*Mynd: Áki Bertholdsen*



*Tónaskøld, tónleikarar og útgevarar savnaðir í Listaskálanum* *Mynd: Áki Bertholdsen*

# Tónleikur og upplestur á »Gamla meiarínum«

Sunnudagin seinnapart var framførsla í hølunum hjá Grímu á Gamla meiarínum. Tónleikararnir Stamen Stanchev, klaver, Nikolas Kapnas, violin, og Jens Christian Guttesen, cello, spældu Klavertrio D-dur nr. 6 eftir Franz Josef Haydn og Klavertrio, opus 3 nr. 1 í C-moll eftir Ludwig van Beethoven. Sjónleikararnir Birita Mohr og Súsanna Tórgarð lósu yrkingar eftir Friedrich Schiller og Johann Wolfgang von Goethe í týðing eftir Janus Djurhuus og Christian Matras.

Tú skalt sanniliga spenna teg út, um tú skalt fylgja við í Havn. Fríggjakvøldið í Norðurlandahúsinum til stórfingna frumframførslu av fyrstu føroysku symfoniini, sum Sunleif Rasmussen hevur skrivað, og sunnudagin í “Meiarínum” til eina intima kamarframførslu, um til ber at siga soleiðis, við væl fyrireikaðum og sera dugnaligum listafólkum. Tað er ikki eiti á.

Tað tónlistarliga eri eg ikki før fyri at gera viðmerkingar til, tað fara onnur, kønari fólk at greiða okkum frá. Men mín uppliving av tí lítlu konsertini á Meiarínum var, at eg akkurát tað sama kundi sitið í onkrum konsertsali úti í stóru verð. Tað var hugtakandi.

Yrkjararnir Goethe og Schiller vóru samtíðarmenn við Haydn og Beethoven, kanska var tað tí, teir vórðu valdir til upplestur. At lesa yrkingar upp er eitt sera torført kynstur, og Birita og Súsanna høvdu ikki nakra lætta uppgávu við hesum tekstunum. Tær vóru væl fyrireikaðar og kláraðu samanumtikið uppgávuna væl. “Thekla kvøður” (Schiller) er ein eitt sindur tungur biti, og týðingin eftir Janus Djurhuus virkaði knortlut, tá ið hon var lisin upp. Tað var ikki sjónleikarans ábyrgd. Tá fall “Nánd unnustunar” (Goethe), sum Chr. Matras hevur týtt ólíka lættari.

“Álvakongur” (Goethe) í fínari týðing eftir Janus Djurhuus er ein perla. Birita og Súsanna lósu hana upp sum dialog, Súsanna las reglurnar hjá dronginum og pápanum, Birita tær hjá álvakonginum og álvadøtrunum. Eftir mínum tykki kom tað demoniska, hóttandi huglagið ikki nóg væl fram, men eg skal viðganga, at eg kanska havi ringt við at meta rættvíst, tí eg eri so hugtikin av tolkingini hjá Dietrich Fischer-Diskau. Tá ið hann syngur lagið eftir Schubert til yrkingina, rennur tað mær kalt niður eftir bakinum, hóast eg havi hoyrt ta framførsluna mangar ferðir. Pianisturin Jóhannes Andreasen og tenorsangarin Ernst Dalsgarð framførdu hesa útgávu í einari av sjónvarpssendingunum “Kanska um hundrað ár”, sum Hanus Andreassen gjørdi um Janus Djurhuus í 1989. Bæði klaverspælið og sangurin eru sera krevjandi, men hóast teir báðir vóru nakað nógv yngri og ikki høvdu so nógvar royndir enn, sluppu teir ótrúliga væl frá tí.

Best dámdi mær “Náttarfrið” (Über allen Gipfeln ist Ruh’) eftir Goethe í týðing eftir Janus Djurhuus. Birita og Súsanna lósu hana upp tvíraddaða, tað virkaði nakað sum at hoyra duett millum sopran og alt. Yrkingin kom upp á tann mátan at virka fleirdimensionell, framførslan gav eitt slag av ekkóeffekti, sum hóskar væl til innihaldið.

Samanumtikið var hetta ein rík løta. Takk skulu tit hava, sum skipa fyri.

**Kirsten Brix**


PF LEIF MOHR
Stovnað 1935

KPMG

PF Leif Mohr
**sóknast eftir verkfrøðingi ella el-installatøri.**

Til PF Leif Mohr verður søkt eftir verkfrøðingi ella el-installatøri at vera við í dagligu leiðsluni av handverkaradeildini.

**Felagið**
Høvuðsvirksemið hjá P/F Leif Mohr kann býtast í tríggjar høvuðsgreinar. Handverkaradeildin, sum fevnir um el-innlegging, ráðgeving og sølu av el-tilfari, heilsølan og LM-handilin, sum fevna um sølu av hvítvørum, audio/video og hi-fi v.m.

Í løtuni starvast 43 fólk hjá felagnum, harav 25 starvast í handverkaradeildini.

**Starvið**
Felagið hevur stórar avbjóðingar fyri framman. Tann ið settur verður, kemur saman við leiðslu felagsins at seta upp málini fyri deildina og tryggja, at málini verða rokkin. Hann skal eisini saman við stjóranum leggja til rættis marknaðarføringina hjá deildini.

Tann ið settur verður, kemur at vera við í dagligu leiðsluni av handverkaradeildini. Fremsta uppgávan verður at samskipa arbeiðið á deildini, bæði innanfyri deildina og í mun til restina av fyritøkuni.

**Umsøkjarin**
Umsøkjarin skal vera útbúgvin verkfrøðingur ella el-installatørur ella hava aðra viðkomandi útbúgving.

Tað er ein fyrimunur, um viðkomandi hevur royndir í projektering og ráðgeving, og at hann hevur leiðsluroyndir. Somuleiðis er tað ein fyrimunur at hava hollan kunnleika til edv og enskt.

Viðkomandi skal vera opin og fyrikomandi.

**Umsóknin**
Umsóknin verður at senda til KPMG statsaut. revisorar Sp/f innan 10. apríl 2000.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Paula Ellefsen ella Árna Ellefsen á telefon 34 34 34.

Allir fyrispurningar og umsóknir verða viðgjørd í trúnaði.

KPMG statsaut. revisorar Sp/f
Postsmoga 3258, FO-110 Tórshavn, Tel 34 34 34, Fax 34 34 35

p/f Leif Mohr Smyrilsvegur 2 Postboks 3100 FO-110 Tórshavn Tel 311220 Fax 314862 e-mail: lm@leif-mohr.fo www.leif-mohr.fo